MENTAMÁLARÁÐIÐ

# UNITED WORLD COLLEGE

Red Cross Nordic United World College Foundation bjóðar einum føroyskum skúlanæmingi, ið er liðugur í 1. flokki í eini gymnasialari miðnámsútbúgving á sumri 2015, at taka IB (International Baccalaureate) eftir 2 árum á einum altjóða studentaskúla í Dale í Noregi. Dale liggur umleið 100 km norðan fyri Bergen. IB (International Baccalaureate) er eitt altjóða studentsprógv, ið gevur somu rættindi innan hægri framhaldslestur sum eitt føroyskt studentsprógv.

Endamálið hjá skúlanum er at fremja altjóða sátt og semju í verki, og verður hetta m.a. gjørt við, at næmingar úr umleið 70 ymiskum londum búgva og lesa saman á skúlanum.

Studni rindar – eftir umsókn – skúlagjald umframt fyri innivist í skúlanum. Hetta merkir, at viðkomandi umsøkjari, sum verður valdur, ikki samstundis frá Studna fær stuðul sum útibúgvandi. Ferðing aftur og fram millum skúlan og Føroyar verður goldin sambært galdandi reglum hjá Studna. Upphæddin er í 2015 kr. 4.000.

Nærri upplýsingar um skúlan fáast við at venda sær til Mentamálaráðið á telefon 55 50 37 ella til lestrarvegleiðingina í skúlanum, har tú gongur. Tú kanst eisini finna fleiri upplýsingar um skúlan á hesi heimasíðuni: http://uwcrcn.no/

Umsókn um upptøku á Red Cross Nordic United World College, ljóstak av seinastu støðumetunum saman við eini stuttari frágreiðing um teg sjálva/n í umsóknarblaðnum skulu vera Mentamálaráðnum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 27. februar 2015. Útfylt umsóknarblað og ljóstak av seinastu støðumetunum skulu sendast til claus@mmr.fo .

Umsóknarblaðið er at finna á heimasíðuni hjá Mentamálaráðnum www.mmr.fo undir “Kunning - Oyðubløð – Vinnu og miðnámsskúlar”.

**Mentamálaráðið, 4. februar 2015**